18
BYGMA
www.balslev.fo
BALSLEV

Fram til jóla lata vit **20% í avsláttri** av øllum baðirúmsmøblum og baðirúmskranum




Vegurin Langi
tel 34 50 00
balslev@balslev.fo

9
Jólagávan til hennara
So nýtist tær ikki at bíða til seinastu løtu




í SMS
Tel 31 15 15
DEMMUS

# Soleiðis sleppur ein undan eldsbruna á jólum

**Við nógvum livandi ljósum á jólum er altíð ein vandi fyri eldsbruna, - um ein ikki tekur ávís fyrilit. Her koma 10 slík ráð:**

1. Far aldrin úr einum rúmi, har stearinljós eru tendrað
2. Ger tínar adventskransar og jóladekorasjónir við umhugsni. Set stearinljósini soleiðis, at tey ikki festa í grannið ella turrar greinar, tá tey brenna
3. Brúka helst sjálvsløkkjandi ljós, ella ljósmanchettir úr stanniol til livandi ljós, í adventskransum og jóladekorasjónum. Hetta minkar um vandan fyri, at stearinljósini festa í grannið, mosan og annað, tá ljósið brennur niður
4. Viðger adventskransar og jóladekorasjónir við brunatálmandi evni, soleiðis at minni vandi er fyri eldi. Hóast hetta, er neyðugt at hava eftirlit við jóladekorasjónini
5. Set ikki livandi ljós í nánd av gardinum og øðrum sum lættliga festist í, ella hagar smábørn, hundar og kettur røkka. Brúka heldur elektrisk ljós um neyðugt
6. Ansa væl eftir brenniovninum, tá tú festir í. Lat lúkuna aftur, so gløður ikki koma á trægólvið ella gólvteppið
7. Hugsa um brunavandan, tá jóladøgverðin verður matgjørdur. Halt eyga við matinum og syrg fyri, at øll bluss ella kókiplátur eru sløkt, tá tú fert frá húsum
8. Hav sløkkiútgerð tøka. Ein blómusirmari ella ein kanna við vatni er oftast nóg mikið til at sløkkja eldin í einum adventskransi ella jóladekorasjón. Hevur tú livandi ljós á jólatrænum, eigur tú at hava minst eina spann við vatni og ein gólvklút ella ein 2 kilo stóran pulvursløkkjara tøkan
9. Syrg fyri, at jólatræið er nýtt - lat tað standa uttandura, inntil tað skal brúkast. Set træið á ein fót, sum kann fyllast við vatni. Hygg dagliga eftir vatnstøðuni og fyll á um neyðugt. Brúka sjáldsløkkjandi ljós á jólatrænum (ella elektrisk ljós), og set tey soleiðis, at eldur hvørki kann festast í grann ella prýði
10. Syrg fyri at hava roykalarmar rætt monteraðar í húsinum, og ansa eftir um teir virka.

*(Kelda: Boligejernes Videncenter)*

